# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## ES gongur aftur

ES málið er sum eitt spøkilsi, ið ikki letur seg mana í jørðina, men stútt og støðugt gongur aftur. Uttanríkisráðharrin hevur parkerað málið í eini serfrøðinganevnd. Hetta er tann klassiska loysnin, tá politikkarar ikki tora ella vilja nema við eitt mál. Tað er rættiliga greitt, at ABC2 samgongan ikki hevur nakran serstakan hug at taka støðu til hetta sera stóra og politiskt vandamikla mál í hesum valskeiði.

Tað er bert ein av samgonguflokkunum, ið hevur eina heilt greiða støðu til ES. Sambandsflokkurin tykist rættiliga avkláraður og vil hava limaskap, men flokkurin sjálvur er hinvegin ikki serstakliga virkin á økinum. Sambandsflokkurin tykist lata virksemið at virka fyri ES limaskapi ella fastari tilknýti til ES fult og heilt til fólkatingsmann floksins. Edmund Joensen virkar íðin á økinum og ansar eftir, at ES ikki verður gloymt men áhaldandi er á politisku dagsskránni.

Sum nevnt hevur uttanríksisráðharrin, sum er kroystur av ES málinum, lagt hetta mál til eina serfrøðinganevnd, alt meðan hann talar um EFTA sum eina góða loysn fyri Føroyar. Men hóast nógvar royndir í ABC2 at fortrongja ES málið ella at parkera tað, so heldur hetta mál sum sagt áfram við at spøkja. Tað tykjast alla tíðina at vera kreftir í samfelagnum, sum hava ein ellan annan áhuga í at halda lív í hesum máli. Er tað ikki ein so er tað annar, ið birtir upp undir tjakið og tað kann bert vera gott fyri málið sum heild.

Reiðarafelagið kemur nú, sum vit skrivaðu í blaðnum fyri vikuskiftið, við áhugaverdari fráboðan um ES málið. Hesin máttmikli felagskapur, ið telur Føroya mætastu vinnulívmenn millum sínar limir, sigur bart út, at nú mugu vit taka støðu til ES limaskapin ongantíð ov skjótt. Vit skulu altso ikki bíða eftir parkeringsvørðunum hjá Jørgen.

Er Reiðarafelagið sostatt klárt á málinum, tá talan er um støðutøku, so er felagið tó knapt so greitt, tá talan er um sjálvan limaskapin. Her er felagið meira varið. Meðan Reiðarafelagið sostatt sigur, at føroyingar mugu ongantíð ov skjótt taka støðu til spurningin um ES limaskap ella ikki, so er felagið týðuliga í iva hvørt vit skulu gerast limir í ES ella ikki. Tað er sjálvandi gongdin í Íslandi í ES málinum, sum fær Reiðarafelagið at ressast og fyrivarni kemur helst av, at Reiðarafelagið ikki trýr teimum, sum siga, at vit kunnu varðveita ræðið á fiskivinnupolitikkinum, um vit gerast limir.

Hinvegin peikar Reiðarafelagið á innlýsandi fyrimunir við limaskapinum, men ger samstundis vart við, at føroyingar vita ov lítið til tess at kunna taka støðu. Hesum ivast vit í, men er tað veruliga so, kunnu vit bert vóna, at serfrøðinganevndin ber skjótt at og kemur við frágreiðingini í hesum árinum. Hetta ikki tí vit vænta so nógv nýtt, sum vit ikki vistu frammanundan, men tí, at tað er satt sum sagt er, at tað veruliga hastar við eini avgerð í ES málinum. Vit mugu samtíðis fylgja gongdini í grannalondunum Íslandi og Noregi.

**Sosialurin**

## Kanna flogleið á strandferðslugrundarlag

JOHN JOHANNESSEN



**Við lágum flogkostnaði høvdu Føroyar flutt seg frá at vera útjaðari til at vera eitt høgligt pláss at arbeiða í, at útbúgva seg í, at granska í og allir okkara útisetar høvdu kunnað havt nærri og natúrligari samband hendan vegin. Hetta er ein almenn uppgáva, sum er týdningarmiklari enn at vísa á vinning á niðastu reglu í einum roknskapi**

Neyðugt er at flúgva. Soleiðis kunnu vit í dag helst umskriva gamla latínska orðatakið, um at neyðugt er at sigla. Øll eru samd um, at tað hevur avgerandi týdning fyri framburð, vitanarstøði og framhaldandi búseting í Føroyum, at vit hava eitt gott, reglubligt og bíligt flogsamband við umheimin.

Neyðugt er at sigla. Tað eru vit eisini samd um. Tí stendur eitt samt ting aftan fyri, at landið millum annað røkir siglingina millum Suðuroynna og Havnina við stásiligum nýggjum skipi og góðtekur, at farleiðin gevur rættiliga stórt undirskot. Ferðaseðlaprísurin er ikki ásettur eftir marknaðartreytum, men fastsettur út frá, hvat hildið verður rímiligt. Restina rindar landið.

Men hvussu er við flogleiðini? Har er prísurin ásettur soleiðis, at leiðin skal geva yvirskot. Tí er kostnaðarmikið at flúgva. Og av somu orsøk er flytførið ella mobiliteturin ikki nóg góður.

**Menningarvisjón**

Okkurt skurrar, tá eitt alment flogfelag spælir privat og letur sum um tað er kapping á økinum. Almenn feløg eru almenn, tí tey hava nøkur mál, sum hava størri týdning enn at skapa vinning. Tað eru nøkur samfelgaslig mál, ið viga tyngri enn málini hjá vanligum privatum fyritøkum.

Vit eiga at seta hesi mál upp og kanna, um tey vera uppfylt við hesum almenna felagnum. Vit hava eitt gott flogfelag, eingin ivi um tað. Men vit hava ikki megnað at gera almenna flogfelagið til eitt felag, sum í nóg stóran mun er við til at menna føroyska samfelagið. Við at givið fleiri føroyingum høvi at ferðast aftur og fram, høvdu Føroyar kunnað ment seg á fleiri økjum. Føroyar høvdu flutt seg frá at vera útjaðari til at vera eitt høgligt pláss at arbeiða í, at útbúgva seg í, at granska í og allir okkara útisetar høvdu kunnað havt nærri og náttúrligari samband hendan vegin. Hetta er ein almenn uppgáva, sum er týdningarmiklari enn at vísa á vinning á niðastu reglu.

**Hvør rindar í dag?**

Ein annar spurningur er, hvør í veruleikanum rindar fyri flogleiðina sum er. Tað er ongin ivi um, at brúkarin rindar alt ov nógv. Men eg havi eisini varhugan av, at landið rindar rættiliga nógv av rakstrinum. Í øllum førum væl oman fyri 50 milliónir um árið ella meira. Bert Heilsuverkið einsamalt rindar árliga oman fyri 20 milliónir krónur fyri flutning av sjúklingum.

Tí er spurningurin, um tað ikki hevði verið ein rímiligur tanki at hugsa, at flogleiðin kundi verið rókt á sama hátt sum Strandferðslan. Tað vil siga, at man tók undir við hugsanini, um at neyðugt er at flúgva og síðani ásetti ein fastan lágan ferðaseðlaprís. Hetta hevði merkt, at landið rindaði undirskotið av rakstrinum.

Ongin ivi er um, at hetta hevði økt munandi um flytførið, og vit høvdu fingið eitt veruligt ferðslulop. Fjarstøðan ímillum Føroyar mitt í Norðuratlantshavi og meginlandið hevði horvið og harvið hevði verið lættari at gjørt Føroyar til miðdepil á so nógvum økjum. Tí er spurningurin, um vit yvirhøvur kunnu brúka orðið "undirskot" í hesum samanhangi. Tí tann peningurin, ið varð latin út, hevði í ríkiligt mát komið inn aftur á øðrum økjum. Júst hetta er eisini meginorsøkin til, at vit hava bundið landið saman við vegum, tunlum og ferjum og góðtaka at rinda raksturin av hesum.

**Byrja greiningina**

Í hesum sambandi havi eg í fyrstu atløgu biðið Fíggjarmálaráðið lýsa og gera upp, hvussu nógvur peningur árliga verður førdur úr landskassanum til PF Atlantic Airways sum stuðul, gjald fyri tænastur, gjald fyri ferðaseðlar og sum aðrar peningarflytingar og síðani flokka tølini eftir slagi av tænastum.

Tá svar er komið frá Fíggjarmálaráðnum, ætli eg mær at brúka tað sum grundarlag fyri einum skrivligum fyrispurningi til landsstýrismannin í samferðslumálum, soleiðis at tingið á kvalifiseraðum grundarlag kann fáa høvi at viðgera meginhugsanina kring møguleikan fyri einari samhaldsfast fíggjaðari loftbrúgv ímillum Føroyar og meginlandið.

Eg ímyndi mær, at slík skipan kundi verið galdandi á flogleiðini ímillum Føroyar og Keypmannahavn, har flestu føroyingar hava sambond í dag og haðani føroyingar hava siðvenju at flúgva víðari út í heim.

Nú tá tað almenna hevur bjargað øllum bankakervinum í vesturevropa, sum skuldi eitast at arbeiða eftir marknaðarkreftum, er tað kanska ikki so løgið at nevna tað almenna sum ein hollan viðleikara, tá landið skal mennast við betri altjóða ferðamøguleikum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.